Kunngerðablaðið A

2023 Givið út 11. september 2023

Nr. 99 6. september 2023

**Kunngerð um broyting í kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli til arbeiðsleys á fiskavirkjum**
(Broytt krøv fyri at vera í fiskavirkisskipanini)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 161 frá 17. desember 2009 um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli til arbeiðsleys á fiskavirkjum verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Heitið á kunngerðini verður orðað soleiðis:

"**Kunngerð um reglur fyri fiskavirkisskipanina og útgjald av arbeiðsloysisstuðli til arbeiðsleys á fiskavirkjum**"

**2.** Í innganginum verður "seinast" strikað.

**3.** § 5, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Um tann arbeiðsleysi í fýra vikur á rað ikki hevur havt í minsta lagi 16 arbeiðstímar á tí fiskavirki, viðkomandi hevur tilknýti til, verður viðkomandi ikki roknaður sum arbeiðsleysur á fiskavirkinum longur og fær ongan arbeiðsloysisstuðul eftir hesi kunngerð uttan við at lata inn nýggja umsókn um arbeiðsloysisstuðul sambært § 6, sum í fyrsta lagi fær virknað fýra vikur eftir, at viðkomandi er farin úr fiskavirkisskipanini sambært hesi grein."

**4.** Í § 5 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Hjá persóni, sum sambært avtalu við fiskavirkið ikki arbeiðir fulla tíð, verður tímatalið í stk. 2 stytt samsvarandi."

**5.** Í § 6, stk. 3, verður aftan á "arbeiðsávísing" sett: "sbr. tó § 5, stk. 2".

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Kravið um arbeiðstímar í § 1, nr. 3, byrjar at telja við útgjaldsskeiðinum, sum byrjar 4. september 2023.

Umhvørvismálaráðið, 6. september 2023

**Ingilín D. Strøm (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Pól E. Egholm (sign.)